# Næsta Oyggjablað: Svínoy

**Oyggjablaðið mikudagin hevur Svínoy í fokus. Lesið í hesum blaðnum millum annað:**



Sólvá (24) er yngsta fólkið



Atla dámar at koma aftur til heimbygdina



Eyðun hevur úr at gera



87 ára gamla Elisabeth fer til handils



Regin tekur ímóti øllum ferðafólkunum

# Hov væntar avlop í ár

**KOMMUNUR** Næstminsta kommunan í Suðuroynni, Hovs kommuna, metir at inntøkan í ár verður uppá 3,3 mió krónur.




*Skattainntøkan í Hovi verður væntandi tann sama sum í fjør. Haraftrat væntast eitt yvirskot í ár*

**Hov:** 1. november 2010 búðu 119 fólk í kommununi. Bert Fámjins kommuna er minni.

Í fjør metti Hovs kommuna, at inntøkurnar fóru at verða smáar 3,2 mió. kr.

- Men tá gjørt varð upp fyri árið 2010, vóru skattainntøkurnar í Hovi góðar 3,3 mió krónur, skrivar Suðuroyarportalurin, sum hevur gjørt eitt yvirlit yvir inntøkurnar hjá kommununum í oynni.

Inntøkan hjá Hovs kommunu var somuleiðis 0,1 mió krónur størri enn mett.

**0,1 mió**

Við árslok hevði Hovs kommuna eina lániskuld á 0,9 mió krónur.

Kommunan átti tó smáar 0,2 mió innistandandi. Nettoskuldin var sostatt 0,7 mió við árslok.

Hovs kommuna metir, at inntøkurnar fyri árið 2011 verða 3,3 mió. kr., sum er umleið tað sama, sum kom inn í skatti í 2010.

Kommunan hevur ikki nakrar íløgur á fíggjarætlanini, um ein sær burtur frá Ellis- og røktarheiminum í Vági. Her er parturin hjá Hovs kommunu smáar 2 mió krónur.

Hovs kommuna roknar við einum avlopi á góðar 0,1 mió á fíggjarætlanini í 2011.

*snorri@sosialurin.fo*

# Bjóða ungum dansarum til Klaksvíkar

**Fríggjakvøldið fer Klaksvíkar Dansifelag at skipa fyri einum dansitiltaki, ið serliga vendir sær til tað unga fólkið. Tiltakið verður í Skálanum í Klaksvík.**

Snorri Brend

**Klaksvík:** Fyri einum ári síðan varð skipað fyri einum dansikvøldi fyri ung, og eydnaðist tað stak væl. Her varð ein sjónvarpsupptøka gjørd, tá tey kvøðu Hr. Sinklar og Stolt Signhild. Hesar upptøkur kunnu síggjast á netinum á YouTube.

Klaksvíkar dansifelag hevur fleiri ung, sum bæði eru við í barnadansinum og ofta við teimum vaksnu.

Hugsanin kom upp, at tey høvdu brúk fyri einum tiltaki bara fyri ung, har tey fingu tað uppá sín máta. Allarbest var eisini, um fleiri komu úr øðrum dansifeløgum og eisini ung, sum ikki dansa í feløgum, men bara dáma tann føroyska dansin.

- Okkara ungu hava seinastu árini verið á leguni Ung í dansi, ið er ein lega sum Slái Ring hevur hvørt heyst. Norðoyingar hava møtt væl upp til Ung í dansi og verið glaðir fyri at møta øðrum dansiglaðum ungdómi, verður sagt úr felagnum. Tí fara tey at bjóða øðrum norður til eitt dansikvøld, nú í bestu dansitíð.

Dansikvøldið verður fríggjakvøldið 4. februar og byrjar kl. 20.30 í Skálanum í Klaksvík.

# Ferðamannaskip fyri 4,1 mia á Klaksvík

Havnaløgini í Klaksvík og nýggju Norðhavnini teljast millum bestu atløgupláss í landinum. Her hava nógv skip ligið, og í 2012 fær Klaksvíkar Havn serstaka vitjan.

Sambært teim upplýsingum sum fram eru komnir, kemur ferðamannaskipið Celebrity Eclipse á vitjan í Klaksvík á sumri næsta ár. Skipið varð latið eigarum sínum í fjør og kostaði 750 mió dollarar.

- Hetta er størsta ferðamannaskip sum nakrantíð hevur lagt at í Klaksvík, verður upplýst.




*Celebrity Eclipse er systurskip til fleiri onnur ferðamannaskip sum eru heimahoyrandi á Malta. Kostnaðurin fyri Eclipse, sum vitjar í Klaksvík summarið 2012, var 750 mió dollarar - svarandi til omanfyri 4,1 mia føroyskar krónur*

Sum skilst fær Klaksvíkar Havn eisini vitjan at ferðamannaskipi í summar. Tá fer nevniliga ferðamannaskipið Saga Ruby at vitja her tvær ferðir, bæði í juni og aftur í august.

Umframt hetta finst nógv virksemi í Norðhavnini, sum er knýtt at fiskivinnuhøvuðsstaði okkara, her skip í hópatali koma inn at avskipa og ferma gjøgnum árið.

*snorri@sosialurin.fo*